# Ommusonurin seldi lutaseðilin



*Jóhan Pauli Johansen, frá Tórshavnar Ítróttarráð, handar her Marjun Ferjá úr Streymnesi nýggja Toyota Corolla. Fremst á myndini er stolti ommusonurin, Atli undir Kletti, sum seldi ommuni lutaseðilin*

**Úrslitið av at Marjun Ferjá í Streymnesi keypti lutaseðlar frá ommusoninum í Havn, Atla undir Kletti, varð at honn vann ein Toyota Corolla. Tað var Tórshavnar Ítróttarráð sum burturlutaði bilin**

VINNINGUR
*Magnus Gunnarsson*

Ein av vinningunum á lutaseðlunum hjá Tórshavnar Ítróttarráði í summar var ein Toyota Corolla sedan. Nógv ungfólk ganga í húsini og selja hesar lutaseðlar. Ein av teimum var 12 ára gamli havnardrongurin, Atli undir Kletti.

Marjun Ferjá í Streymnesi, ið er omma Atla, keypti fýra lutaseðlar ein dagin hon var í Havn.

Seinni kom Atli norður til Streymnesar og hevði nakrar lutaseðlar við sær, sum hann seldi har í bygdini. Marjun keypti tá ein lutaseðil frá honum. Tað vísti seg at tá drigið var, hevði Marjun vunnið ein Toyota Corolla upp á tann seðilin, sum hon keypti í Streymnesi. Hetta var ein Corolla sedan við bensinmotori.

Av tí at hon arbeiðir á Lágargarði í Havn aðruhvørja viku, fekk hon býtt bilin um við ein Corolla 2,0 hatchback við dieselmotori. Marjun er sera fegin um vinningin, bilurin hjá teimum var vorðin fimm ára gamal, so tað kom væl við at fáa ein nýggjan bil ókeypis.


# SUMMARSTEVNA
## á Selatrað

Vikuskiftið 22.-23. aug. verður summarstevna Javnaðarfloksins hildin á skótadeplinum á Selatrað.

Karmarnir um summarstevnuna í ár verða teir allarbestu á hugnaliga skótadeplinum. Tí verður eisini lagt soleiðis til rættis, at javnaðarfólk kunnu møta fjølment, konur og menn, børn, ung og gomul.

Fríggjakvøldið byrjar við hugna um bálið, við røðu, søgum og sangi – afturvið harmonikutónum og onkrum til matnað.

Leygardagin verða tiltøk og spøl til børn, fyrilestur og sjónleikur – alt í tí friðarliga og vakra umhvørvinum á Selatrað. Ein part av degnum verður floksleiðslufundur har álitisfólk floksins møta. Tá er samstundis skipað fyri øðrum tiltøkum fyri tey, sum ikki luttaka á floksleiðslufundinum.

Til ber at gista á skótadeplinum, har pláss er fyri eini 60 fólkum.

Er veðrið ikki til vildar til øll tiltøk uttandura, ber til at vera inni í stórum tjaldum og felagshúsinum

**Summarstevnuskráin er henda:**

**Fríggjadagin:**

| | |
|---|---|
| kl. 20.00 | Søgur og sangur um bálið |
| | – Frits Johannesen heldur bálrøðu. Okkurt er til matnað og drekka |

**Leygardagin:**

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 | Morgunmatur |
| kl. 10.00 | Gongutúrur, onnur tiltøk og spæl |
| kl. 10.00 | Floksleiðslufundur |
| kl. 12.00 | Døgurði |
| kl. 13.00 | Viðgerð av politiskum tilmælum |
| kl. 13.00 | Tiltøk fyri børn |
| kl. 15.00 | Lossingarmenn í Havn - Erland V. Joensen greiðir frá |
| kl. 16.00 | Sjónleikur - GRÍMA við søgum úr Krabbaurð |
| kl. 18.00 | Náttverði |

Fyri at tryggja sær pláss at gista og til høvuðsmáltíðirnar er neyðugt at melda seg til á tel. 312 493, 225 344 ella á tel 221 919 ella á heimasíðuni www.javnadarflokkurin.fo.

Vælkomin og møtið fjølment!

**Føroya Javnaðarflokkur og Sosialistiskt Ungmannafelag**

# Javnaðarflokkurin

Sosialurin 341800



## MÓTTØKA

**Í sambandi við, at FSF-húsið alment verður tikið í nýtslu, verður skipað fyri almennari móttøku í húsinum, mikudagin 20. august 2003, frá kl. 14.00 til kl. 16.30.**

Millum gestir okkara hendan dagin verður Hr. Joseph S. Blatter, FIFA-presidentur og Hr. Eggert Magnússon, UEFA-nevndarlimur.

***Høvið verður hjá fólki at síggja húsið.***

Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA – UEFA – ISF






*Ferðslutrygd heitir á bilførarar um at hava næmingarnar, ið byrja í 1. flokki nú mánadagin, í huga*

*Savnsmynd*

# Mánadagin fara 748 børn í skúla á fyrsta sinni

**– Tað man mangan vera við bivandi hjarta, at foreldur senda síni smáu á skúlans leið, sigur Ferðslutrygd, sum minnir bilførarar á at sýna størsta varsemi, nú so nógv børn verða á gøtunum**

FERÐSLUTRYGD
*Tíðindaskriv*

Mánadagin 18. august er summarfrítíðin av og tá fara 748 næmingar í skúla fyri fyrstu ferð.

Tað man mangan vera við bivandi hjarta, at foreldur senda síni smáu á skúlans leið, og hugmyndin um lítla barnið í millum bilar og bussar er satt at siga skakandi. Helst vildu foreldur sloppið at fylgt børnunum heilt til skúladyrnar. Men tað er verri enn so altíð, at tað ber til, tí tey skulu jú møta til arbeiðis sjálvi um somu tíð. Harafturat man tað í mongum førum vera so, at børnini vilja sleppa at ganga sjálvi – tey vilja ikki hava foreldrini við – tey eru jú byrjað at ganga í skúla!

Sum vant fáa børnini 1. skúladag ein faldara heim við til foreldrini, har tað verður greitt frá um trupulleikarnar viðvíkjandi børnum og ferðslu.

Tá ið vit komandi vikurnar hasta á veg til arbeiðis í bilum við køldum, osandi motori og bilrútum, sum hava hug at døgga, mugu vit hava teir nýbyrjaðu næmingarnar í 1. flokki í huga, heilsar Ferðslutrygd.

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

# Herverk fyri kr. 20.000

**Hósnáttina varð álvarsligt herverk framt í Sandvík**

HERVERK
*Hans Kárason Mikkelsen*



*Savnsmynd*

Eitt ferðalag úr Havnini var farið ein túr til Suðuroyar, og tey høvdu tríggjar bilar við sær, sum allir blivu illa skøvaðir við steini. Hesir vóru parkeraðir fyri náttina uttan fyri húsini, sum eigaranir høvdu leigað sær í Sandvík.

– Morgunin eftir høvdu allir bilarnir djúpar skøvur, og ókvæmisorð vóru rist við steini inn í lakkið, sigur Tummas Jacobsen, bileigari. Tummas metir, at hetta fer at kosta teimum einar kr. 20,000 í nýlakering, so illa teir er skøvaðir.

Løgreglan í Suðuroynni hevur í skrivandi løtu ikki illgruna til nakran ávísan persón ella persónar. Tó siga teir á politistøðini, at ábendingar er um, at ungdómar standa aftan fyri herverkið.

– Ókvæmisorðini, sum vóru rist inn í lakkið á bilunum eru eisini at síggja á skúlaveggjunum, sigur Poul Poulsen, sum heldur, at hetta er tekin um, at ungt fólk stendur aftanfyri.





At keypa ella byggja er ein avgerð, ið ávirkar tilveruna mong ár framyvir. Somuleiðis stinga fleiri spurningar seg upp, tá ið tú fert at mynda heimið: Hvar og hvussu vil eg búgva? Hvørjar møguleikar havi eg?

Í FØROYA BANKA kunnu vit veita tær holla ráðgeving, soleiðis at tú kanst taka avgerðir, ið tú kanst liva við.

Tørvar húsunum ábøtur, kunnu vit hjálpa tær at fíggja útbyggingina, nýggja baðirúmið, køkin o.s.fr.

Tað er skilagott at seta seg í samband við okkum, áðrenn tú fert í holt við at leggja ætlanir - soleiðis fært tú vissu fyri, at tú fært røttu fíggingina, og veitst, hvussu hetta fer at ávirka fíggjarstøðu tína. Vit geva tær betri ráð...

FØROYA BANKI